# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Tað er einki annað enn nátúrligt, at allur Javnaðarflokkurin atkvøður fyri einum slíkum uppskoti (um at verja samkynd í revsilógini). Men valla livir flokkurin upp til vøkru hugsjónina um tollyndi við teirri tingmanning, flokkurin hevur*

ODDAGREININ

## Sjálvsøgd viðurkenning

Fyri sløkum 19 árum síðani slitnaði ein landsstýrissamgonga, tí at eitt ískoyti til grein 266 b í revsilógini var borið niðan í tingið. Mikið rumbul stóðst av hesum sum førdi við sær, at tey samkyndu framvegis ikki eru vard í revsilógini.

Javnan hevur kjakið verið frammi, og tað er láturligt – men oftast grátuligt – at fylgja orðaskiftinum. Tað er tokutala, tá tingmenn tosa um at generalisera lógargreinina við at koyra allar bólkar út – og ongan nevna positivt. Heilt margháttligt verður tað, tá ein bláoygdur sambandstingmaður ætlar sær í Fólkatingið at fremja hesa broyting.

Seinastu vikurnar hava vit frætt um harðskap móti samkyndum, sum kundi verið steðgaður og revsaður við nevndu lógarbroyting.

Tað er tí at fegnast um, at løgmaður hevur meldað so greitt út í hesum máli, hvat hann heldur, at løgtingið eigur at gera. Tað er eisini at fegnast um, at sjey tjóðveldistingfólk leggja málið fram aftur á ting – og eitt herðaklapp eiga Hergeir Nielsen og Páll á Reynatúgvu fyri at tora at viðganga, at teir nú hava skift hugsan og atkvøða fyri uppskotinum.

Tað er einki annað enn nátúrligt, at allur Javnaðarflokkurin atkvøður fyri einum slíkum uppskoti. Men valla livir flokkurin upp til vøkru hugsjónina um tollyndi við teirri tingmanning, flokkurin hevur. Sannlíkt er tó, at menn sum Henrik Old og Sverre Midjord fara at gera sum Páll og Hergeir.

Tað er eisini at fegnast um, at bispur eisini er fyri, at samkynd verða vard í revsilógini. Hetta man fáa onkrar sambandstingmenn at hugsa seg um enn einaferð – og saman við Poul Michelsen og kanska onkrum øðrum við í Fólkaflokkinum, so sær út til at minnilutin verður til meiriluta – og at tey samkyndu hereftir verða vard í revsilógin.

Tað hevði tænt okkara samfelag - nú vit skriva 2006.

**Sosialurin**

# Enn eitt fullveldisroknistykki við ongum skili í

**HELGI ABRAHAMSEN**



Rætting til ein roknimeistara, sum royndi sítt kynstur á løgtingsins røðarapalli tann 4. oktober.

Politikarar úr loysingarflokkunum kunnu onkuntíð brúka ótrúliga stuttlig roknistykki, tá teir skulu sannføra onnur (og helst seg sjálvan eisini) um, at blokkstuðulin úr Danmark er óneyðugur, fyri ikki at siga skaðiligur fyri føroyska búskapin. Eitt tað nýggjasta skotið á hesi stammuni sá dagsins ljós undir fíggjarlógarviðgerðini, tá Páll á Reynatúgvu helt framsøgurøðu vegna Tjóðveldisflokkin.

### Roknistykkið

Páll á Reynatúgvu segði, at blokkstuðulin er 615 mió. krónur um árið, sum svarar til 12.500 krónur fyri hvønn føroying. Henda upphæddin, býtt yvir 365 dagar, gevur 35 krónur um dagin í part. Og seta vit okkum fyri, at fáa blokkin burtur eftir 10 árum, so kostar tað, sambært Páll á Reynatúgvu, ein tíggjundapart av hesum (3 krónur og 50 oyru um dagin í part).

Hetta ljóðar sum søtur musikkur í oyrunum, og tú fært hug at spyrja, hví vit ikki hava gjørt hetta fyri langari tíð síðani. 3 krónur og 50 oyru eru ikki nógvir pengar.

Men steðga nú eitt sindur, tí her er okkurt spinnandi galið.

### Gloymdi at falda inntøkusíðuna

Vit mugu minnast til, at líkamikið um kostnaðurin av at strika blokkstuðulin verður býttur yvir 10 ár ella 100 ár, so broytir tað ikki upphæddina, sum vit missa. Páll á Reynatúgvu býtir 615 mió. krónur yvir 10 ár, men gloymir at taka við í roknistykkið, at blokkstuðulin í 10 ár er ikki 615 mió. krónur verdur, men 10 ferðir 615 mió. krónur. Og tí verður kostnaðurin framvegis 35 krónur um dagin fyri hvønn føroying.

Um upphæddin minkar spakuliga yvir 10 ár, so kostar tað hvørjum føroyingi 3 krónur og 50 oyru um dagin tað fyrsta árið, men longu næsta árið verður kostnaðurin tvær ferðir 3 krónur og 50 oyru. Aftaná 10 ár er kostnaðurin 10 ferðir 3 krónur og 50 oyru og harvið er hann komin uppaftur á 35 krónur um dagin í part.

35 krónur ljóða ikki av nógvum. Men fyri eitt húski við 5 fólkum eru tað 175 krónur um dagin, ella 1.225 krónur um vikuna. Tað svarar til góðar 5.000 krónur um mánaðin og knappar 64.000 krónur um árið. Tað eru nógvir pengar at gjalda– serliga tá tú einki fært afturfyri.

### Skiftistíðin broytir einki

Ein long skiftistíð ger okkum hvørki ríkari ella fátækari, men hon kann sjálvsagt brúkast til at yvirtala fólk til at taka undir við loysingini, tí hon virkar ikki so ógvusligt, sum tá rokningin kemur frá degi til dags.

### Soleiðis rokna vit okkum fram til eitt skattaparadís

Um vit lána roknistykkið frá Pálli av Reynatúgvu eina løtu, og ístaðin fyri at rokna blokkstuðul, heldur brúka tað til at rokna skatt, og lat okkum siga, at málið er at gera Føroyar til eitt skattaparadís, har allur landsskattur er burtur um 10 ár, so sær roknistykkið soleiðis út:

Vanligi landsskatturin verður komandi ár mettar til at fara at verða 1.370 mió. krónur. Tað svarar til 27.850 krónur um árið fyri hvønn føroying, ella 76 krónur og 30 oyru um dagin. So um vit seta okkum fyri at sleppa undan øllum landsskatti um 10 ár, so kostar tað bara 7 krónur og 63 oyru um dagin.

Tað vil siga, at um tú hevur eina dagløn á 800 krónur, so hevur tú meira enn 792 krónur eftir, tá landið hevur fingið sítt, og aftaná 10 ár ert tú fullkomuliga leysur av at gjalda landsskatt – restina av lívinum. Ljóðar tað ikki eisini sum søtur musikkur?

Øll sum hava sæð eina skattarokning vita, at tílík roknistykki hava einki við veruleikan at gera.

# Føroyskir kórsatsir útkomnir í Danmark

**NÓTABÓK**

Fýra kórsatsir, sum Kári Bæk hevur skrivað, eru komnir úr í Danmark.

Løgini eru ”Nú rennur sólin fríð” við tí føroyska Kingolagnum, ”Lover nu Herren og ”Nun loob, mein Seel”, sum er satsur við tveimum samansettum løgum, ”Græsset grønnes” og ”Vårstrofe”. Teir báðir seinastu eru við teksti hjá Williami Heinesen.

Tað er tónleikaforlagið Edition Wilhelm Hansen, sum gevur út.

Sangirnir eru allir á nýggju kórfløguni Flóðir av ljósi.




**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.